# 41. umboðsráðsfundur FKF 2009

# Formansfrágreiðing

## Innihald

1. Inngangur ........................................................................ 2
2. Uppgávu- og ábyrgdarbýti ímillum land og kommunur . 3
3. Eitt Kommunufelag......................................................... 4
4. Onnur mál av týdningi .................................................... 5
4.1 Almannamál ............................................................... 5
4.2 Mentamál ................................................................... 6
4.3 Fíggjarmál .................................................................. 6
5. Verkætlanir...................................................................... 7
5.1 Agenda 21 stovan....................................................... 7
5.2 Okkara lív sum eldri................................................... 7
6. At enda ........................................................................... 8

## 1. Inngangur

Góðan dagin góðu fundarfólk og hjartaliga vælkomin til tann 41. umboðsráðsfundin hjá Føroya Kommunufelag.

Eg vil fyrst nýta høvið til at ynskja øllum umboðráðslimum tilukku við valinum, og ein serlig heilsan til tykkum, ið eru nývald.

Eisini vil eg nýta høvið til at bjóða tveimum nýggjum kommunum vælkomnum, nevniliga Vága - og Eystur kommunu.

Eg skal í hesari fyrstu formansfrágreiðing míni greiða frá virksemi felagsins í farna ári. Eg tók við formanspostinum fyri knøppum ári síðani, 1. mars 2008, eftir at fyrrverandi formaður Rósa Samuelsen aftaná 3 ár í formansessinum varð vald í Løgtingið og í hesum sambandi segði frá sær formanssessin.

Enn einaferð, freistast man at siga, hevur virksemi felagsins í farna ári verið merkt av ógreiðu landspolitisku støðuni. Løgtingsval var í januar 2008, og nakað eftir hetta varð sokallaða CHE - samgongan skipað. Henni var tó ikki langt lív lagað, og í heyst varð nýggj samgonga skipað.

At vit hava havt tríggjar samgongur seinasta góða árið hevur merkt, at virkisførið hjá skiftandi landsstýrum ikki hevur verið nøktandi. Avleiðing av hesum kundi verið, at felagið tískil ikki hevur havt eins nógv lógar- og kunngerðaruppskot til hoyringar, sammett við fleiri av undanfarnu árum. Men veruleikin er ein annar.

Við árslok 2007 vórðu hópin av uppskotum send felagnum til hoyringar, tí nógv skuldi náast fyri valið í januar 2008. Partar av samgonguni, ið sat frá 2004 til 2008, ætlaði at leingja samgonguskeiðið nakrar vikur og hevði í hesum sambandi borið hópin av uppskotum niðan í tingið. Tá henda ætlanin miseydnaðist fullu øll uppskotini burtur. Eftir valið í januar varð nýggj samgonga skipað, og hendan nýggja samgonga byrjar so smátt at koma við sínum uppskotum, samstundis sum uppskot frá undanfarnu samgongu eisini koma til hoyringar í felagnum, men nú sum andstøðuuppskot. Tá ið CHE- samgongan slitnaði fullu øll uppskot frá henni burtur, men koma nú í fleiri førum aftur sum andstøðuuppskot. Samstundis byrjar sitandi samgonga, sum er júst tann sama, sum sat frá 2004 til 2008, at leita uppskot fram aftur, ið fullu burtur í samband við valið í 2008. Viðgerðin av uppskotum er av tí sama ofta alt ov drúgv og ofta óneyðug.

Við at hyggja eftir tveimum teimum seinastu samgonguskjølunum, so hómast hóast alt ein breið semja á kommunalpolitiska økinum. Breið semja tykist vera um

- At fleiri virkisøki skulu leggjast kommununum at umsita
- At kommunalu eindirnar/samstarvsøkini skulu vera væl størri.
- At ein útjavningaskipan skal gerast
- At fólkaskúlin og/ella eldarøkið eru næstu økini, ið leggjast skulu út.

Eisini tykist rættliga breið semja verða um, at veruligar broytingar skulu henda í hesum júst byrjaða kommunuskeiði, bæði tá tað snýr seg uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og tá ið tað snýr seg um sjálvan kommunubygnaðin.

Tí er væl hugsandi, at vit komandi fýra árini koma at síggja munandi broytingar, bæði tá ið hugsað verður um kommunurnar, og tá ið hugsað verður um sjálvt kommunufelagið.

## 2. Uppgávu- og ábyrgdarbýti ímillum land og kommunur

Nógv tekin eru sostatt um, at stórar og søguligar broytingar fara fram á kommunala økinum komandi 4 árini.

Tað eru nógv ár liðin, síðani sokallaða “Grøna álitið” var latið úr hondum. Í hesum áliti var uppskot um nýggjan kommunalan bygnað, eins og uppskot var um eitt greiðari býti millum land og kommunur.

Men síðani er lítið hent. Talið av kommunum er nakað minkað, men kommunurnar eru enn 30 í tali. Ávís øki eru løgd kommununum at umsita, eitt nú dagstovnaøkið og partar av barnaverndarøkinum.

Men tær broytingar, sum farnar eru fram, hava ikki verið partar av nakrari heildarætlan fyri kommunala økið.

Í 2007 var bleiv lógin um sjálvbodna kommunusamanlegging og kommunal samstørv samtykt. Felagið viðmerkti í hesum sambandi, at eingin meining var í at seta strikur í Føroyakortið, uttan av hava veruligar ætlanir um broytingar á kommunala økinum.

Felagið ynskti, at gjørd varð ein heildarætlan fyri kommunala økið. Ein ætlan, ið gjørdi greitt, hvørji øki skuldu leggjast út  til kommunurnar, í hvørjari raðfylgju, hvussu hesi skuldi fíggjast, og hvussu ein útjavningarskipan, ið gav øllum økjum í landinum menningarmøguleikar, skuldi skipast.

Føroya Kommunufelag hevur í øllum samskifti við landsmyndugleikarnar gjørt vart við hesi sjónarmið, og tað tykist sum landsins myndugleikar hava tikið júst hesi sjónarmið til eftirtektar, nú loksins gongd er komin í arbeiðið at gera eina heildarætlan fyri kommunala økið.

Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevur í hesum mánaðinum sett ein arbeiðsbólk við umboðum úr flestu aðalráðum og báðum kommunufeløgunum. Undir heitinum umskipan av kommunala geiranum er arbeiðsbólkurin settur at gera uppskot til millum annað

- Kommunalar eindir
- Millumkommunala útjavning
- Raðfesting av uppgávum, ið leggjast skulu út

Eftir ætlan skal bólkurin vera liðugur við arbeiðið longu innan Ólavssøku í ár, og eftir ætlan skal fyrsta stóra økið leggjast kommununum at umsita 1. januar 2011.



Felagið hevur ætlanir um regluliga at kunna limakommunurnar um abeiðið og umrøða viðurskifti í hesum sambandi, til tess at tryggja at øll sleppa til orðanna, hóast tað neyvan nakrantíð fæst ein skipan, sum øll treytaleyst taka undir við. Felagið rúmar fleiri mótstríðandi áskoðanir, bæði tá ið tað snýr seg um at definera  eina burðardygga kommunala eind, eins og tá ið gerast skal ein rættvís útjavningarskipan.

## 3. Eitt Kommunufelag

Havandi í huga tær broytingar, sum helst verða framdar á kommunala økinum komandi árini, tykist tíðin eisini at verða farin frá at hava tvey kommunufeløg í Føroyum.

Føroya Kommunufelag hevur lagt stóra orku í samráðingarnar við KSF um at fáa skipað eitt kommunufelag í Føroyum, ið kann umboða allar kommunur í Føroyum.

Samráðingarnar hava verið drúgvar, og ringt hevur verið at finna semju millum feløgini, serliga hvussu politiska samansetingin av einum nýggjum felag skal síggja út.

Men undan kommunuvalinum var nærum komið á mál, og limakommunurnar í Føroya Kommunufelag høvdu fingið eitt uppskot til hoyringar. Undirtøka var ikki millum allar kommunur í okkara felag, og tað vísti seg eisini, at størsta kommunan í hinum felagnum ikki kundi taka undir við uppskotinum, og endin varð, at KSF ynskti málið útsett til eftir valið. Síðani hevur KSF sent felagnum áheitan um at taka uppaftur samráðingar at skipa eitt nýtt felag.

Samráðingar verða helst tiknar upp, so skjótt nýtt stýri hevur skipað seg. Felagið vil eisini í hesum sambandi skipa fyri regluligari kunning til limirnar, soleiðis at øll sleppa til orðanna, hóast vit eisini í hesum hesum máli helst mugu staðfesta, at tað verður ringt at verða øllum kommunum til vildar.

Tað er eingin loyna, at feløgini hava verið ymisk á máli eitt nú viðvíkjandi spurninginum um útjavning. Men júst tað, at feløgini hava verið ósamd, ber eisini boð um, at vit higartil hava havt tørv á tveimum feløgum, ið hava havt mótstríðandi áhugamál. Men í feløgum báðum eru eisini innanhýsis ósemjur um útjavningarspurningin eins og um spurningin um samanleggingar.

Harumframt heldur gamla uppáhaldið, at annað felagið er fyri størru kommunur, og at hitt er fyri tær smærru, ikki longur. Nýggja Vága -og Eystur kommuna eru báðar ímillum fimm tær størstu kommunurnar í landinum.

So spurningurin er, um tíðin ikki er komin til at stovna eitt nýtt felag fyri allar kommunur í Føroyum. Ósemjur, sum við vissu eru í báðum feløgunum í dag, koma framhaldandi at verða, sjálvt um stovnað verður eitt nýtt felag. Men hesar ósemjur mugu undir øllum umstøðum loysast, líkamikið um talan er um eitt ella tvey feløg.

Tað er lítil ivi um, at eitt felag fer at kunna veita munandi betri tænastur til limakommunurnar, enn verandi tvey feløg megna. Við at leggja fyrisitingarnar saman verður

munandi lættari hjá felagnum at taka á seg tær avbjóðingar, ið broytingarnar av kommunala geiranum koma at hava við sær.

Tað skal tí verða mín vón, at nýggja stýrið eisini fer í konstruktivar samráðingar við KSF um at stovnseta eitt nýtt felag.

## 4. Onnur mál av týdningi

### 4.1 Almannamál

Dagstovnaøkið og partar av barnaverndarøkinum hava nú í fleiri ár verið kommunalt ábyrgdarøki. Tað er lítil ivi um, at økini eru vorðin nógv hægri raðfest, eftir at tey eru vorðin kommunal. Nærum allar kommunur hava í dag nøktað tørvin á barnaansing, eins og tænastan á barnavendarøkinum er nógv batnað.

Men tað er heldur eingin loyna, at útreiðslurnar til bæði økini eru vaksnar munandi, eftir at kommunurnar hava yvirtikið tey.

Seinasta árið hava fleiri kommunur gjørt vart við, at útreiðslurnar til serliga barnavernd eru nógv vaksnar, og at fíggjarlig stýring av júst hesum øki er sera torfør. Felagið hevur ætlanir um at taka hendan trupulleikan upp í inniverandi ári. Eisini er neyðugt at taka trupulleikan við manglandi tilboðum á samdøgurstovum upp við landsmyndugleikarnar. Manglandi tilboð av stovnsplássum hava við sær, at útreiðslurnar hjá kommunalu barnaverndartænastunum vaksa, eins og at børn stundum verða send av landinum á stovnar uttanlands. Henda støða er als ikki nøktandi.

Broytingarnar í § 5 í dagstovnalógini hava givið komununum afturvendandi trupulleikar. Sambært lógarbroytingini skuldu kommunur yvirtaka ábyrgdina av børnum við serligum tørvi, ið kundu integrerast á kommunalum stovnum. Hinvegin skuldi landið taka ábyrgd av teimum, ið ikki vóru mett at kunna vera á einum vanligum stovni. Men tá ið sera fá tilboð eru til børn við serligum tørvi, endar ábyrgdin av hesum børnum ofta hjá kommununum. Broytingarnar í § 5 í dagstovnalógina eiga at verða endurskoðaðar, og greiðari skilnaður eigur at verða gjørdur ímillum ábyrgdina hjá kommunu og avíkavist landi.

Eisini trupulleikar viðvíkjandi fíggjarligum fríplássum hava verið afturvendandi hjá kommununum. Farnu árini hava kommunurnar játtað fíggjarlig frípláss út frá skattskyldugu inntøkuni hjá foreldrunum. Men í kunngerð um fíggjarlig frípláss er eisini heimilað kommununum at geva foreldrum fíggjarligt frípláss út frá eini heildarmeting av fíggjarstøðu familjurnar. Úttalilsi frá almannaráðnum hava staðfest, at foreldur hava rætt til at fáa gjørt eina heildarmeting av fíggjarstøðuni, tá tey søkja um fíggjarlig frípláss. Felagið metir ikki, at kommunurnar í verandi støðu hava møguleikan at málsviðgera slík mál, og hevur tí heitt á almannaráðið um at fáa broytt kunngerðina.

Felagið var í fjør saman við Almanna og Heilsuráðnum, Mentamálaráðnum, Løgregluni og KSF við til at stovnseta eitt SSP samstarv í Føroyum.



SSP er eitt samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politi og hevur til endamáls at fyribyrgja kriminaliteti. Felagið metir, at slíkt samstarv í síðsta enda fer at løna seg og síggjast aftur í minkandi útreiðslum á barnaverndarøkinum.

Eisini eldraøkið hevur verið á breddanum í farna ári. Í samband við sparingar á fíggjarlógini valdi landstýrið at skerja allan stuðulin á 4 mill kr til dagtilhaldini runt landið. Føroya Kommunufelag átalaði harðliga hesa framferð. Fráboðanin um sparingina kom, eftir at flestu kommunur høvdu samtykt fíggjarlógina fyri 2009, og kann hetta als ikki góðtakast. Felagið ynskir, at gjørd verður ein bindandi avtala ímillum land og kommunur, soleiðis at tað ikki ber til hjá landinum at áleggja kommununum útreiðslur, uttan at samráðingar og avtala er gjørd um hetta millum land og kommunur.

Eftir øllum at døma verður eldrøkið ímillum fyrstu økini, ið skulu leggjast út til kommunurnar at umsita. Men tað er neyðugt, at land og kommunur gera sær greitt, at hetta økið í framtíðini verður sera útreiðslukrevjandi. Tí mugu kommunurnar krevja, at hædd verður tikin fyri hesum, tá ið fíggjarligar broytingar skulu gerast millum land og kommunur.

Ansingarøkið, eldraøkið og mentunarøkið eru annars merkt av alt ov nógvum grásonum, har ivi er um ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunur.

Í samband við arbeiði at umskipa kommunala geiran eigur eisini at verða hugt eftir øllum teimum økjum, har ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunur er ógreitt.

### 4.2 Mentamál

Fólkaskúlin hevur eisini verið á breddanum seinast árið. Serliga Pisa kanningarnar bóru boð um, at fólkaskúlin ikki virkar optimalt. Men kommunurnar partur liggur ikki eftir á hesum øki. Eftir at hava dagført ansingarøkið, hava kommunurnar farnu árini lagt orku í at byggja nýggjar skúlar. Sambært fíggjarætlanunum fyri 2008 fór umleið helmingur av øllum íløgum hjá kommununum til mentamál.

Sambært ætlanum hjá landsstýrinum skal skúlin verða millum fyrstu uppgávur, ið skulu leggjast kommununum at umsita. Eisini her er neyðugt, at land og kommunur gera sær greitt, at skúlaøkið uttan iva verður eitt øki, sum í framtíðini kemur at krevja stórar uppraðfestingar.

Felagið hevur gjørt útgreinandi arbeiði viðvíkjandi fólkaskúlanum, ið skuldi verið við til at brynja okkum til samráðingar um yvirtøku av økinum.

### 4.3 Fíggjarmál

Fíggjarligu útlitini tykjast í løtuni ikki góð. Heimssamfelagið er í svárari fíggjarligari kreppu, og henda kreppa er so smátt við raka okkum føroyingar eisini.

Sum ikki einaferð tykist kreppan at raka ójavnt í føroyska samfelagnum. Kommunur og øki í landinum, ið eru bundin at fiskivinnuni, eru sum ikki einaferð meinast rakt. Hetta sama gjørdi seg galdandi í sambandi við kreppuna í 1990 –unum.

Veruleikin er, at tann ójavni, sum er og altíð vil verða millum kommunurnar og økini í Føroyum, gerst størri í ringum tíðum.

Hetta kemst sjálvsagt av, at fiskivinnan í størri mun enn eitt nú almenni geirin og handilsvinnan er tengd at heimsbúskapinum

Tí er tað umráðandi, at vit fáa fleiri støðug almenn og kommunal arbeiðspláss runt um í landinum. Besta loysnin er at leggja fleiri øki út til kommunurnar at umsita.

Men tað er eisini neyðugt, at vit í Føroyum fáa eina samhaldsfasta útjavningarskipan.

Búskaparráðið kom fyri góðum ári síðani við einum modelli, hvussu ein slík skipan skuldi síggja út. Uppskotið var áhugavert og átti at kunnað verið grundarlag fyri framhaldandi arbeiðnum at finna eina greiða og rættvísa skipan.

## 5. Verkætlanir

### 5.1 Agenda 21 stovan

Í 2004 fór okkara felag í gongd við eina verkætlan at kanna, um áhugi var ímillum kommunurnar at seta eina ráðgevingarstovu á stovn á Agenda 21 økinum. Tað vísti seg, at áhugi var fyri at royna hetta, og virksemið á Agenda 21 stovuni fór so spakuliga í gongd.

Síðan tað hevur virksemið á stovuni ment seg, samstundis sum virksemið á umhvørvis- og trivnaðarøkinum í kommununum hevur ment seg í stórum seinastu árini.

Gott samstarv hevur verið ímillum felagið, kommunurnar og Innlendismálaráðið á hesum øki, og fer hetta samstarv vónandi at halda fram næstu árini.

Í 2008 hevur virksemið á stovuni, eins og undanfarin ár, verið yvir ein breiðan kamb. Arbeitt hevur verið við lokalum verkætlanum í kommununum og skipað er fyri kunning og ráðgeving

Á kunningarøkinum er heimasíðan hjá stovuni virkin. Í september skipaði stovan m.a. fyri eini kunningarferð til Samsø fyri kommunufólki.

Saman við kommununum er m.a. eisini arbeitt í 2008 við eini felags yvirlýsing fyri Agenda 21 økið. Hetta arbeiðið er næstan liðugt, og fyrst í komandi ári fáa kommunurnar møguleika at taka støðu til hesa yvirlýsingina, ið gevur møguleika at skipa kommunala virksemið við atliti til umhvørvisvernd og burðardygga menning.

Vit sum kommunur hava okkara ábyrgd sum umsitarar úti í lokaløkjunum og eiga tí sjálvsagt at gera okkara lut í at tryggja framtíðina fyri okkara eftirkomarar.

### 5.2 Okkara lív sum eldri

Á heysti 2007 samtykti stýri felagsins vegna limirnar at luttaka í tvørtjóðaligu verkætlanini OLE2. OLE merkir "Okkara Lív sum Eldri" og er seinri partur av tveimum. Í OLE2 verða tilmælini frá fyrra partinum sett í verk.

Endamálið við OLE2 er at fremja viðmælini frá fyrra partinum av verkætlanini. Fyri føroysku kommunurnar er tað upplagt at brúka hendan møguleikan at fáa bygt upp umstøður fyri eldri borgarar, sum vilja koma kommununi til góðar í framtíðini. Sum dømi um hetta er minni tørvur á stovnsplássum, um fólk eru før fyri at búgva longur heima.



Viðmælini vísa á tørv á aktivitetum, sum avloysa arbeiðsdagin, og á felagsskapi, sum avloysir arbeiðsfelagar, tá eldri borgarar fara frá. Endamálið við aktivitetum av hesum slag er at fáa skapt møguleikar fyri netverkum, sum stuðla undir betri lívsgóðsku hjá eldri borgarum.

At skapa umstøður fyri netverkum, sum eldri borgarin **sjálvur** stendur fyri, har hann hevur møguleika at vera saman við øðrum, at samskifta við familju og/ella onnur við somu áhugamálum og at fáa til vega upplýsingar, teir hava fyri neyðini. Hetta er tað, vit fara at taka upp í OLE 2.

Úrslitið frá verkætlanini verður dokumenterað við einum leisti, sum kommunur her - sum í øðrum londum - kunnu brúka.

2 limakommunur hava meldað luttøku, Porkeri og Sunda kommuna.

Verkætlanin verður stuðlað av Evropa Samveldinum, og okkara samstarvsfelagar eru Oulu kommuna í Finnlandi og Luelå kommuna í Svøríki.

## 6. At enda

Sum eg nevndi í byrjani kann hetta valskeiðið koma at verða søguligt í nógvar mátar. Umfatandi broytingar í kommunala bygnaðinum gerast helst veruleiki innan hetta valskeiðið er útrunnið, og helst gerst eitt kommunufelag eisini veruleiki, innan alt ov long tíð er runnin.

Men spurningurin er, um tíðin ikki er komin til umfatandi broytingar. Hugburðurin hjá fólki tykist eisini at verða eitt ynski um størri kommunalar eindir, eins og flest øll eru á einum máli um, at kommunurnar eiga at fáa ræðisrættin á fleiri vælferðartænastum.

Vit hava sum felag og sum kommunur stórar avbjóðingar fyri framman. Tað er neyðugt, at tann broytingin, ið nú fer fram, verður væl fyrireikað, og at allar kommunur kenna seg hava ávirkan á endaliga úrslitið

Somuleiðis er umráðandi, at land og kommunur finna felags stev í fyrireikingunum til stóru bygnaðarbroytingar, ið skulu fara fram. Endamálið má verða at fáa eitt samfelag, ið mennist í javnvág, og har borgarar í øllum landinum hava rætt til grundleggjandi vælferðartænastur.

At enda fari eg vegna stýrið at takka fyri gott samstarv seinastu 4 árini. Somuleiðis takki eg stýrinum og starvsfólki á skrivstovuni fyri dyggan stuðul og gott samstarv í míni formanstíð.

Takk fyri

Fylgiskjal 1: Hagtøl frá journalini

41 mál vóru skrásett í FKF journalini í 2008.




*Prosentbýti av málum á journal økini*




*Prosentbýti av málum á adressatar*




*Prosentbýti á evnini málini handla um*



Fylgiskjal 2: Hagtøl úr roknskapinum

Fundarluttøka hjá umboðum Føroya Kommunufelags

Tilsamans 188 fundar- og/ella ferðapengar vóru útgoldnir í 2008.




*Prosentbýti av umboðum FKF á fundarslag*
*grundað á útgoldnar fundar- og / ella ferðaútreiðslur*




*Prosentbýti av umboðum FKF á starvsheiti*
*grundað á útgoldnar fundar- og ferðaútreiðslur*

Fylgiskjal 3: Umboðan

## Umboðan Føroya Kommunufelags úteftir

| Bólkur, nevnd e.l. | Navn |
|---|---|
| AHR: Elektronisk skipan fyri heilsuverkið | Sveiney Sverrisdóttir, skr. FKF |
| AHR: Stýrið fyri serflutningsskipanina | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Almannastovan: Samstarvsbólkur | Eyðun Christiansen, ráðg. FKF |
| Arbeiðsumhvørvisráðið | Johanna Olsen, Sunda kommunu |
| Barnaverndarstovan | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Byggi- og býarskipanarnevndin, eykalimur | Oluffa Joensen, Gøta |
| Byggi- og býarskipanarnevndin, limur | Jógvan Páll Joensen, Sørvágur |
| FKF: Felags kommunalar journalreglur | Sveiney Sverrisdóttir, skr. FKF |
| Hagstova Føroya, fólkateljing | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| ISF: oyggjaleikafyrireiking | Eyðun Christiansen rág. FKF |
| Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Karl Olsen, Vestmanna |
| Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Petur í Túni, Toftum |
| MMR: Bókasavnsøkið | Eyðun Christiansen, ráðgevi FKF |
| MMR: Musikskúlaskipanin | Eyðun Christiansen, ráðg. FKF |
| Ráðið fyri Brekað | Marjun S. Olsen, Vestmanna |
| Ráðið fyri ferðslutrygd | Hervør Guttesen, Bø |
| Skúlin á Trøðni, skúlastýrið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Skúlin á Trøðni, upptøkunevnd | Hallbjørg Lamhauge, Barnaverndarstovan |
| Stýrið f. ALS, eykalimur | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| Toll og Skattaráðið | Asbjørn Djurhuus, form. FKF |
| VMR: Demokratia | Karl A. Olsen, Vestmanna |
| VMR: Javnstøðunevndin | Eyðun Christiansen rág. FKF |
| VMR: Norðoya Tunnelin | Poul Andr. Joensen, Leirvík |